# Troyttir menn vunnu á hvíldum monnum

**Tað sást væl, at føroysku spælararnir høvdu verið í harðari venjing, og at mótstøðumenninir úr Liktinstein bara høvdu fyrireikað seg til hesa uppgávuna**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Føroyska fótbóltslandsliðið fór seinnapartin í fyrradagin við røttum ryggi av vøllinum niðri á Kypros. Teir høvdu vunnið 1–0 ímóti Liktinstein. Úrslitið var tað sama, sum tað var fyri knøppum tveimum árum síðani í Vaduz í Liktinstein, málskjúttin var tann sami – Uni Arge skoraði einasta málið – og dystargongdin líktist ikki frítt tí fyri tveimum árum síðani.

Ferðin var ikki serliga høg, mótstøðumenninir høvdu bólin meiri enn føroyska liðið. Teir royndu at spæla millum sín, og tað eydnaðist væl, men teir komu ikki til nógvar upplagdar málmøguleikar.

Uppskriftin hjá føroyingunum var, sum hon hevur verið nógvu tær síðstu ferðirnar, tá talan hevur verið um telving ímóti øðrum smáum fótbóltstjóðum í Europa.

– Sum eg segði undan dystinum, so var setningurin hjá okkum, sum hann hevur verið, tá vit t. d. hava spælt ímóti Luksemborg og Malta. Tað var lagt spælarunum eina við, at teir máttu ikki leypa framav. Heldur skuldu teir vera tolnir, avgjørdir í taklingunum og alla tíðina hugsa um møguleikan fyri kontraálopum.

Hetta sigur ein væl nøgdur Jógvan Martin Olsen. Hann hevur nú havt ábyrgdina av landsliðnum í tveimum dystum. Um alt gongur, sum tað er ætlað, so fer hann ikki at hava ábyrgdina, tá Liktinstein fer at spæla landsdyst í Føroyum miðskeiðis í august, og hann fer heldur ikki at hava ábyrgdina í EM undankappingini, sum sjøtul fer at verða settur á seinni í ár. Men tað kann ikki sigast annað, enn at Jógvan Martin hevur góð hagtøl at vísa á. Í hansara stjórnartíð hevur landsliðið – í fyri føroyingar vánaligastu fótbóltstíð – spælt tveir landsdystir. Teir hava tapt annan, og teir hava vunnið annan, og samlaði málmunurin er 2–2!

## Føroyar–Liktinstein 1–0 (1–0)

**Í Pafos á Kypros**
**Mikudagin 13. februar 2002, kl. 16.00**

Dómari:
50 áskoðarar
1–0: Uni Arge 23.
Føroyar: 1. Jens Martin KNUDSEN, 54/-141, NSÍ – 4. Jóhannis JOENSEN, 11/0, HB, 5. Bartal ELIASEN, 4/0, GÍ, 3. Jón Rói JACOBSEN, 4/0, HB, 2. Arnbjørn DANIELSEN, 6/0, B36 – 9. Jákup Á BORG, 20/0, B36 (17. Klæmint MATRAS, 1/0, B36, 77.), 10. John PETERSEN, 39/3, liðformaður, B36, 7. Rógvi JACOBSEN, 15/1, HB, 6. Heðin Á LAKJUNI, 7/0, KÍ (13. Hjalgrím ELTTØR, 2/0, KÍ, 81.) – 8. Uni ARGE, 36/8, HB (18. Palli AUGUATINUSSEN, 1/0, VB, 85.), 11. Andrew AV FLØTUM, 3/0, HB (12. Sámal JOENSEN, 24/0, GÍ, 70.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 16. Meinhardt JOENSEN, 0/0, KÍ
Gult kort: Rógvi JACOBSEN 25., Heðin Á LAKJUNI 43., Jóhannis JOENSEN 51., Bartal ELIASEN 52., Jón Rói JACOBSEN 73., Arnbjørn DANIELSEN 90.
Venjari: Jógvan Martin OLSEN
Hjálparvenjari: Jens Martin KNUDSEN
Liðleiðari: Heðin ASKHAM
Ognarrøkil: Birgir HANSEN
Lækni: Jens Pauli MARSTEIN
Fysioterapeutar: John–Reid SKORALÍÐ og Álvur HANSEN
Ferðaleiðari: Dánjal ANDREASEN

Liktinstein:
1. Peter JEHLE, Grasshopper Club Zürich (12. Martin HEEB /USV Eschen/Mauren, 46.) – 7. Martin TELSER, FC Vaduz (15. Mario WOLFINGER, USV Eschen/Mauren, 90.), 6. Daniel HASLER, FC Wil 1900, 5. Michael STOCKLASA, FC Baden, 3. Frédéric GIGON, FC Stade Lausanne (14. Patrik HEFTI, FC Schaan, 88.) – 10. Thomas NIGG, USV Eschen/Mauren, 2. Martin STOCKLASA, FC Zürich (18. Christof RITTER, FC Vaduz, 77.), 4. Andreas GERSTER, FC Vaduz (16. Marco BÜCHEL, FC Balzers, 90.), 11. Matthias BECK, USV Eschen/Mauren, (17. Franz BÜRGMEIER, FC Vaduz, 70.) 9. Thomas BECK, FC Vaduz – 8. BÜCHEL Ronny, BSC Young Boys Bern
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: eingin
Gult kort: 3. Frédérich GIGON 49., 4. Andreas GERSTER 60., Daniel HASLER 87.
Venjari: Ralph LOOSE (TÝS)



*Hjalgrím Elttør var um reppið at skora í sínum fyrsta landsdysti, men skot hansara móti dystarenda fór dygst fram við stólpanum*

### Høvdu møguleikar at leggja lok á

Pól Thorsteinsson var so mikið skaddur, at tað var ikki hugsningur um at hann kundi spæla. Tí var Jón Rói Jacobsen í miðverjuni undir liðini á Bartali Eliasen. Andrew av Fløtum var í álopsplássinum, sum Christian Høgni Jacobsen var í sunnukvøldið. Annars var liðið mannað, sum tað var ímóti Póllandi.

Fyrsta korterið skinklaði føroyska liðið eitt sindur. Tá knapt tjúgu minuttir vóru farnir gjørdist ein av mótstøðumonnunum leysur, men Jens Martin blokeraði meistarliga.

Størra helmingin av fyrra umfarinum var besta løtan hjá føroyska liðnum:

– Hesa løtuna skuldu vit havt lagt lok á. Vit skoraðu eitt mál, og vit høvdu tríggjar aðrar risastórar møguleikar. Um vit høvdu megnað at fingið úrtøku burturúr einum ella tveimum av hesum møguleikunum, so hevði gongdin sjálvandi verið øðrvísi í 2. hálvleiki, enn hon nú gjørdist, men tíbetur megnaðu vit at halda tætt og vinna. At vit vinna ein sovornan dyst hevur alstóran týdning fyri liðið og fyri føroyskan landsliðsfótbólt sum heild, heldur Jógvan Martin Olsen.

Uni Arge stútaði føroyska málið í 23. minutti. Eftir kontraálop í vinstru, varð bólturin beindur út til innkast. Andrew av Fløtum, sum fyri fyrstu ferð var millum teir fyrstu ellivu, smoygdi sær til baklinjuna, innleggið var hegnisliga lagt til handara stólpan, har Uni var púra leysur og skoraði.

Tríggjar minuttir frammanundan hevði Uni Arge – eftir innlegg frá Heðini á Lakjuni – havt ein góðan møguleika, og tað var eisini eftir innlegg frá Heðini, tá Rógvi Jacobsen í 28. minutti stútaði dygst framvið málinum. Í 31. minutti var John Petersen tætt við. Jákup á Borg legði innfyri úr høgru, málverjin hálvbjargaði royndini hjá Una Arge, og so royndi John seg.

### Moyrir og móðir

Eftir steðgin høvdu mótstøðumenninir úr Liktinstein bóltin væl meiri, enn føroysku spælararnir, men tað var bara í 86. minutti, at teir høvdu ein heilt góðan møguleika. Jens Martin Knudsen bjargaði uppi undir tvørtrænum. Í hinum endanum vóru tveir stórir møguleikar. Innskifti og púra leysi Hjalgrím Elttør var í 83. minutti um reppið at skora sítt fyrsta landsliðsmál, men hann sendi dygst framvið, eftir at hann var spældur leysur av John Petersen og innskifta debutantinum Klæmint Matras. Og tveir minuttir seinni spældi Hjalgrím Elttør væl til John Petersen, sum úr spískum í høgru royndi seg.

Føroysku spælararnir løgdu seg í 2. hálvleiki serliga eftir at verja. Uppskriftin var tann sama, sum hon var ímóti Póllandi: Álopsspælararnir lógu aftarlaga, og verjuspælararnir frammarlaga. Tað vil við øðrum orðum siga, at økið, sum tað varð spælt á, var ikki serliga stórt, og tað hevði aftur við sær, at talan var ikki um serliga poleraðan fótbólt.

– Okkara spælarar vóru móðir. Teir høvdu vant í átta dagar í veðri, sum er betri enn besta føroyska summarveðrið, og teir høvdu sunnukvøldið givið alt ímóti Póllandi. Sjálvandi kendist hetta á avrikinum ímóti Liktinstein. Teirra spælarar høvdu fyrireikað seg optimalt til bara henda eina dystin. Tí vóru teir kropsliga betri fyri í 2. hálvleiki. At okkara vóru troyttir sást eisini aftur í, at ikki færri enn seks spælarar fingu gult kort, staðfestir Jógvan Martin Olsen.



# Greiðir favorittar

**Á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum, www.fbf.fo, eru sonevndar quick-poll kanningar, og sambært hesum eru favorittarnir greiðir undan finaludystunum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*Soleiðis sá atkvøðugreiðslan á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum út um døgurðaleitið hósdagin*

TB vinnur kvinnufinaluna og SÍ vinnur mansfinaluni. Skal gangast eftir sonevndu quick-poll kanningunum hjá Flogbóltssambandinum, er eingin ivi um, at hetta verða úrslitini av teimum báðum steypafinalunum, sum verða leiktar á Hálsi í Havn leygardagin.

### Mugu basa royndunum

Í landskappingini er longu nú mest sum avgjørt, at tað verður TB, sum um stutta tíð kann rópa se føroyameistari í kvinnudeildini, og í so máta er kanska einki at siga til, at tær eru favorittar.

Men tað skerst ikki burtur, at høvdu klaksvíkskvinnurnar fingið eitt sindur betri byrjan upp á kappingarárið, so hevði støðan í landskappingini verið ein heilt onnur. Her hevði Mjølnir nevnliga eina søguliga vánaliga byrjan, og tað var ikki, fyrr enn fleiri av »teimum gomlu« komu við aftur, at nakrir sigrar fingust til høldar. Í grundspælinum vunnu tær eisini dystin í Trongisvági móti TB, men tapið á sama stað í endaspælinum førdi við sær, at TB veruliga fekk skrætt seg leyst.

Hóast hetta, so er ein steypafinala altíð nakað serligt, og hóast TB verður mett sum favorittur, so skulu drúgvu royndirnar hjá Mjølni ikki undirmetast í hesum sambandi. Flestu munnu minnast dramatisku finaluna fyri einum ári síðani, tá Mjølnir vendi 0-2 til 3-2 móti Drátti. Nakað sum neyvan hevði verið gjørligt uttan drúgvu royndirnar á liðnum. Royndir, sum gera, at leikarar eisini kunnu halda høvdið kalt, tá nógv stendur á, og tað ger tað aloftast í eini finalu.

Hinvegin skal einki takast frá TB. Tær eru í løtuni á aldukambinum, og viðrákið av hesum kann gera, at tær snøgt sagt ikki duga at tapa. Ein eginleiki, sum ofta fylgir oddaliðum. Í leikarum sum Maju Popovic og Gudrid Nolsøe hava tær eisini trumfkortini, sum kunnu taka stikkið heim, so undir øllum umstøðum røkist fyri eini stak spennandi finalu.

### Kunnu bjarga árinum

Hjá monnunum eru útlitini eisini góð fyri eini spennandi finalu. Tað stuttliga við hesi er helst, at hvørgin parturin í finaluni hevur stórvegis møguleika at vinna sær gullmerkini í landskappingini. Her er Fleyr helst longu sloppið ov langt, so í nógvar mátar er her talan um dystin, sum kann bjarga kappingarárinum.

Ikki minst er hetta galdandi hjá SÍ, sum leingi lá sera væl fyri í landskappingini. Júst hvussu sørvingarnir velja at tackla hetta vónbrotið, kann gerast avgerandi fyri finaludystin. Dvølja tankarnir framvegis við mista gullið í landskappingini er lætt at ímynda sær, at leikarar skjótt missa mótið, um alt ikki gongst eftir vild. Hinvegin kann eisini hugsast, at leikararnir taka hetta sum ein møguleika at fáa nakað burtur úr árinum, og verður hetta hugburðurin, so er einki at ivast í, at fuglfirðingar fara at fáa harða mótstøðu fram til seinasta bólt.

Umframt munin á stigatalvuni, so skal favorittleikluturin hjá SÍ skal helst eisini síggjast í ljósinum av, at tað verður eitt heldur skert ÍF-lið, sum fer til finaluna. Odd Eliasen, sum hevur verið ein av høvuðsleikarunum í góðu úrslitunum í endaspælinum, sleit hælsinuna seinasta vikuskifti, og harafturat hevur Bartal Eliasen verið burturstaddur við fótbóltslandsliðnum, soleiðis at hann ikki hevur verið við til venjingarnar upp til finaludystin.

Tað skal tó ikki nertast við, at ÍF kann fara rættiliga fríttstillað til dystin leygardagin. Hóast teir í fjør gjørdust greipuvinnarar, so hevur liðið nú alt at vinna og einki at tapa, og júst hetta kann fáa leikararnar at tveita allar nervar fyri borð.

Umframt alt hetta, so skal eisini leggjast afturat, at talan aftur í ár verður um finaludyst millum tvíburðarnar báðar, Boban og Borko Ilic. Hetta var eisini støðan í fjør, tá Boban gjørdist tann stinnari parturin. Uttan iva vil Borko gera sítt fyri at hevna hetta, so alt í alt røkist fyri tveimum sera spennandi steypafinalum har fýra lið úr fýra ymiskum feløgum fara at gera sítt til, at talan skal gerast um ein ógloymandi dag fyri bæði leikarar og áskoðarar.

## Kvinnur



**TB:**
**Hvítar troyggjur/bláar brøkur**

| nr | leikari | pláss | hædd | aldur | landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Harriet Hammer | Libero | 160 | 20 | |
| 2 | Ingun Midjord | Miðja | 182 | 17 | |
| 3 | Tóra E. Mortensen | Hevari | 167 | 20 | 4 |
| 4 | Gudrid Nolsøe | Kantur | 171 | 20 | 21 |
| 5 | Winnie T. Djurhuus | Diagonal | 174 | 21 | 4 |
| 6 | Anna-Mia Johansen | Hevari | 165 | 23 | |
| 7 | Maja Popovic | Kantur | 175 | 20 | 5 (Bosnia) |
| 9 | Tórbera S. Joensen | Miðja | 176 | 18 | |
| 10 | Guðrun Dimon | Kantur | 172 | 27 | |
| 12 | Svanna Nielsen | Miðja | 182 | 27 | 9 |

| | |
|---|---|
| Svanna Nielsen | liðformaður |
| Virgar Djurhuus | venjari |
| Romica Øster | Hjálparvenjari |
| Chris N. Peteren | Liðleiðari |



**Mjølnir:**
**Bláar troyggur/bláar brøkur**

| nr | leikari | pláss | hædd | aldur | landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tove Riksfjord | Kantur | 168 | 25 | |
| 2 | Sigrid Mikkelsen | Kantur | 160 | 17 | |
| 3 | Elsa Olsen | Miðja | 172 | 19 | |
| 4 | Anna M. Jacobsen | Diagonal | 167 | 25 | 7 |
| 5 | Vera Larsen | Libero | 162 | 35 | 31 |
| 6 | Linda á Stongunum | Kantur | 165 | 18 | |
| 7 | Berit N. Vilhelmsen | Kantur/miðja | | 175 | 24 |
| 8 | Marjun Kalsø | Hevari | 163 | 39 | 92 |
| 9 | Katrin Petersen | Kantur/hevari | | 160 | 19 |
| 10 | Tina Jacobsen | Miðja | 180 | 21 | 20 |
| 11 | Vivi Andreasen | Kantur/miðja | | 169 | 25 |
| 12 | Lena í Buð | Miðja | 173 | 19 | |

| | |
|---|---|
| Marjun Kalsø | liðformaður |
| Jón Kári Frederiksen | Venjari |
| Margit G. Joensen | Hjálparvenjari |
| Sólvá Eystberg | Hjálparvenjari |
| Sigrid Andreasen | Liðleiðari |

## Menn



**SÍ:**
**Bláar troyggur/svartar brøkur**

| nr | leikari | pláss | hædd | aldur | landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kaj á Stongunum | Hevari | 171 | 21 | |
| 2 | Ólavur Jensen | Hevari | 173 | 17 | |
| 3 | Hans Fróði Jensen | Miðblokkur | 177 | 19 | |
| 4 | Kári Mikkelsen | Diagonal/kantur | 177 | 16 | |
| 5 | Ragnar Niclasen | Kantur/hevari | 179 | 16 | |
| 6 | Jón Falkvard | Miðblokkur | 187 | 21 | |
| 7 | Suni Hansen | Miðblokkur | 188 | 38 | 64 |
| 8 | Jón Nielsen | Diagonal/kantur | 191 | 21 | 5 |
| 9 | Borko Ilic | Kantur | 192 | 27 | 18 (Bosnia) |
| 10 | Annfinn Joensen | Diagonal/miðblokkur | 195 | 34 | 18 |
| 11 | Rajko Petrovic | Diagonal/kantur | 201 | 29 | |
| 13 | Jóhan Petur á Stongum | Libero | 173 | 16 | |

| | |
|---|---|
| Jón Nielsen | Liðformaður |
| Borco Ilic | Venjari |
| Suni Jacobsen | Liðleiðari |
| Jákup á Stongum | Liðleiðari |



**ÍF:**
**Reyðar troyggjur/hvítar brøkur**

| nr | leikari | pláss | hædd | aldur | landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hanus Eliasen | Miðja | 183 | 17 | |
| 2 | Hans Toftegaard | Miðja | 185 | 23 | |
| 3 | Boban Ilic | Kantur | 191 | 27 | 25 (Bosnia) |
| 5 | Dánjal Wang | Miðja | 185 | 18 | |
| 6 | Henry Petersen | Kantur/diagonal | 179 | 18 | |
| 7 | Kenneth Neshamar | Diagonal | 187 | 26 | 12 |
| 8 | Jan Áki Olsen | Miðja | 183 | 24 | |
| 9 | Odd Eliasen | Hevari | 178 | 38 | 35 |
| 10 | Bartal Eliasen | Kantur | 189 | 25 | 7 |
| 11 | Árni Petersen | Miðja | 185 | 20 | |
| 12 | Høgni Madsen | Hevari | 174 | 16 | |

| | |
|---|---|
| Bartal Eliasen | Liðformaður |
| Boban Ilic | venjari |
| Bjarne Joensen | Hjálparvenjari |
| Ólavur Ellingsgaard | Hjálparvenjari |
| Áslakur R. Petersen | Liðleiðari |